## Selja nógv vápn

Ísraelski vápnaútflutningurin vaks so nógv í fjør, at landið er vorðið heimsins fimtistørsta vápnasøluland. Framman fyri Ísrael eru USA, ES, Russland og Japan.

Í einari frágreiðing um heimsins vápnahandil sæst, at Ísrael seldi vápn og vápnaskipanir fyri næstan 30 milliardir krónur í fjør. Tann størsti einstaki sáttmálin var við Turkaland, sum keypti nútímans stríðsvognar fyri fimm milliardir krónur. Tað landið, sum keypir flest vápn og vápnaskipanir úr Ísrael, er kortini USA. Síðani koma lond í Asia, Evropa og Latínamerika.

Ísraelski vápnaútflutningurin vaks heili 70 prosent í fjør, og tað var serliga India, sum keypti munandi fleiri ísraelsk vápn og vápnaskipanir í 2002 enn frammanundan, og sølan till India fer ætlandi at veksa uppaftur meiri, verður sagt.

## Mannasmuglari tikin

Svenska løgreglan hevur tikið ein iraka, sum avstralsku myndugleikarnir hava leitað eftir í sambandi við eitt mál um mannasmugling. Maðurin varð tikin hósdagin.

Avstraliumenn vilja vera við, at irakski maðurin, sum eitur Khaleef Shnary Daoed, var ein av oddamonnunum aftan fyri eina roynd at smugla fleiri hundrað fólk við einum skipi til Avstralia í oktober í 2001. Skipið sakk, og hildið verður, at umleið 350 fólk druknaðu.

Avstralski løgmálaráðharrin, Christopher Elliot, takkaði í gjár svensku løgregluni, tí hon hevur funnið mannin, og hann boðaði samstundis frá, at Avstralia vil hava irakan útflýggjaðan úr Svøríki.

## Blair vísur í at fáa evruna

45 prosent av bretska fólkinum eru ímóti at seta felags evropeiska gjaldoyrað, evruna, í gildi ístaðin fyri pundið, men kortini kennir Tony Blair, forsætisráðharri, seg vísan í, at meirilutin fer at taka undir við evruni, tá fólkaatkvøða verður um spurningin.

Í einari røðu hósdagin segði Blair, at sambandið við tað evropeiska meginlandið er tað týdningarmesta málið hjá stjórnini júst nú. Hann vísti á, at 60 prosent av bretska uttanríkishandlinum er við onnur lond í Evropa, og hann skuldsetti tey, sum eru ímóti evruni, fyri at vilja seta Bretland uttan fyri tað evropeiska samstarvið. Samstundis segði hann seg vera fullvísan í, at tað vanliga fólkið skilir støðuna, og at fólk fara at atkvøða fyri evruni.

Blair gjørdi vart við, at evran fer ikki at skerja tað politiska rásarúmið hjá Bretlandi í ES, tí stjórnin fer framhaldandi at tryggja, at landið hevur sín egna uttanríkis- og trygdarpolitikk. Eygleiðarar í London siga, at hetta seinasta var ætlað sum ein ávaring til teirra, sum tosa um eitt uppaftur tættari samband millum ES-londini.




**UTTAN ÚR HEIMI**

# Hóttan um yvirgang í Noregi neyvan tilvildarlig

**Norska trygdarløgreglan PST heldur ikki, at tað var eitt mistak, tá Noreg varð nevnt í seinastu hóttanini frá al-Qaeda.**

YVIRGANGSHÓTTAN
*Árni Joensen:*

Síðani varaleiðarin í al-Qaeda, Ayman al-Zawahiri, mikudagin bað muslimar søkja at nøkrum londum og teirra millum Noregi, hava norsku myndugleikarnir økt tilbúgvingina.

Leiðslan í PST sigur, at neyðugt er at hava eitt vakið eyga við norskum áhugamálum uttanlands, og at løgreglan tí hevur mett, hvørji áhugamál kunnu vera mest sannlík sum álopsmál.

Trygdarløgreglan heldur ikki, at tað hevur so nógv at siga í hesum sambandi, at Noreg var ímóti krígnum í Irak, tí tað er greitt, at Noreg kortini verður mett sum eitt av stuðulslondunum hjá USA. Orðini hjá Ayman al-Zawahiri bera eisini boð um, at tað er so, sigur trygdarløgreglan.

PST heldur, at orðini á ljóðbandinum hava fleiri endamál. Tey vóru bæði ein boðskapur til limir og stuðlar hjá al-Qaeda, men eisini eini boð til teirra, ið verða mett sum fíggindar hjá Islam og harvið eisini al-Qaeda, sigur norska trygdarløgreglan. Í triðja lagi skuldi upptøkan prógva, at felagsskapurin hjá Osama bin Laden framvegis er virkin.

## Djarvur smádrongur

Tann trý ára gamli kambodiski drongurin Qeun Sambat hevur ein rættiliga sjáldsaman leikbróður, eina fýra metrar langa pythonslangu. Mamma Qeun sigur, at drongurin og slangan hava hildið saman, síðani Qeun dugdi at grulva. Men hetta kann vera vandamikil leikur, tí slangan kundi lættliga svølgt drongin, kom ilt í hana.



# Kallaði Bush forseta ein forbrendan kal úr Texas

**Er tað háðan ímóti amerikanska forsetanum, at ein ráðharri í einum vinarliga sinnaðum landi kallar hann »hasin forbrendi kalurin úr Texas«?**

ORÐALAG
*Árni Joensen:*

Spurningurin verður í hvussu er umrøddur í Svøríki, eftir at ráðharrin í innflytaramálum, Jan O. Karlsson, verður sagdur at hava nýtt hetta orðalagið um George W. Bush, forseta, á einari samkomu við tíðindafólk mikudagin. Blaðið Expressen endurgav orðini í sjálvari oddagreinini, og blaðmaðurin helt tað vera ovboðið, at ein svenskur ráðharri nýtir slíkt orðalag um ríkisleiðaran í einum øðrum landi.

Jan O. Karlsson dylir ikki fyri, at hann hevur sínar tankar um Bush, forseta, men hann sigur seg ikki minnast at hava nýtt hesi orðini um amerikanska forsetan. Men hann vil heldur ikki leggja Expressen undir at hava lagt honum orðini í munnin.

Amerikanski heilsumálaráðharrin, Tommy G. Thomson, hitti Jan O. Karlsson hósdagin, og har vórðu orðini eisini umrødd.

Gøran Persson, forsætisráðharri, er ikki fegin um orðalagið hjá ráðharra sínum, men hann sigur, at Jan O. Karlsson noyðist loysa trupulleikarnar sjálvur.

- Tað er ikki hóskandi at nýta tílík orð, sama hvar tað er. Málið er álvarssamt, og eg fari at tosa við ráðharran um tað. Men soleiðis kann ein ikki tosa, sigur Gøran Persson, sum kortini ger greitt, at Jan O. Karlsson verður ikki koyrdur úr stjórnini.

Vikuskifti

Nr. 98 • leygardagur • 24. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Orkan úr urkraftini

Øssur Johannesen skrivar um ein tann størsta listamannin í danskari list, Svend Wiig Hansen, sum hevði sterkan áhuga fyri teimum skapandi og oyðandi kreftunum, sum búgva í menniskjanum

Lesið síðu 6 & 7





*Sámal Christiansen og Otto Samuelsen hava spælt við í Klaksvíkar Hornorkestri, síðani tað varð stovnað í 1950*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Hornorkestrið er hjartabarn okkara

Tað siga teir báðir elstu aktivu limirnir í Klaksvíkar Hornorkestri, Sámal Christiansen og Otto Samuelsen. Teir vóru báðir við til at stovna orkestrið í 1950 og hava spælt við síðani. Sosialurin hevur sett teimum stevnu at tosa um teirra drúgvu tænastu

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Sámal og Otto. Sigur tú annan í hornorkesturhøpi kanst tú illa lata vera við at nevna hin. Teir hava sitið so trúfastir í hornorkestrinum við hvør sínari kornett og spælt øll 53 árini, orkestrið hevur verið til.

Teir vóru báðir við til stovnanina av orkestrinum. Tað bleiv stovnað tann 5. mai 1950 á gamla spinnarínum. Tað vóru tólv spælarar, og ongin teirra dugdi so frætt sum at trýsta á ein ventil. Men væl bar til, og í dag telur orkestrið knapt 30 spælarar og øll ljóðførini eru spildurnýggj.

Tað var upprunaliga Evald Kjølbro, sum tók stig til at stovna Klaksvíkar hornblástrarfelag, sum tað æt í fyrstuni. Tað komst av, at drotningavitjan var í 1949, og tá kom Havnar hornorkestur norður til Klaksvíkar at spæla. Tað segði Evald ikki bera til, og so heitti hann á nakrar við sær at stovna eitt hornorkestur í Klaksvík. Her skal tó líka sigast, at tað vóru aðrar royndir at stovna hornorkestur, men teirra livitíð var ikki long. Fyrsti formaður í Klaksvíkar Hornorkestur var Hans Dávid Petersen og fyrsti dirigentur var Sámal Petersen.

– Vit fóru runt at tekna limir, og undirtøkan var góð. Klaksvíkar Hornorkestur hevur altíð fingið góða undirtøku, sigur Sámal. Limagjaldið var tíggju krónur um árið.

Ljóðførini vóru tólv í tali. Tíggju horn og tvær trummur. Tey kostaðu tilsamans 10.000 krónur. Orkestrið fekk góðan stuðul frá kommununi og kontórinum hjá Kjølbro.

Meðan prátað verður um hesi ljóðføri, tekur Sámal eitt gamalt, gult pappír fram og byrjar at lesa hart. Tað er umsóknin hjá teimum til kommununa um stuðul til ljóðførini. Hon er dagfest 29. september 1949. Stuðulin varð teimum játtaður, og sostatt rindaði kommunan ein part av ljóðførunum.

### Góðar søgur

Tað er týðuligt á báðum monnunum, at her liggja nógvar góðar søgur fjaldar. Viðhvørt meðan annar greiðir frá, situr hin og

*Framhald á næstu síðu*